


# Løbner »livir« í gamla kirkjugarði

**Emilius Løbner er eitt navn, sum vit seta í samband við søguligar danskar undanstøkkingar í Føroyum. Tað var jú hann, ið sum kommandantur á Skansanum í 1808 gav seg yvir við orðunum: "Kast jer ned børn og stræk gevær!" Tað vakti tí áhugan at síggja ein gravstein í gamla kirkjugarði við navninum Løbner. Kundi hetta hava nakað við tann Løbner at gera? Jú tað hevur tað!**



*Emilius Løbner, kommandantur og amtmaður. Hansara eftirmælið er, at hann royndi eisini at gagna føroyingum, men tað var ikki altíð at teir vildu sjálvir*



ÓLI JACOBSEN
olij@sosialurin.fo

Fyrsti amtmaður í Føroyum var Emilius Marius Georgius Løbner. Hann var í 1801 útnevndur til kommandant á Skansanum. Í 1816 var hann bráfengis settur amtmaður og endaliga settur í 1821. Hann giftist við Onnu Sofiu, dóttir Tummas Joensen Kiælnes, bøkjara í Havn. Tey fingu tvey børn. Sonurin Ludvig doyði ógiftur í 1853. Henrietta Elisabeth giftist við Napoleon Nolsøe. Løbner var loystur úr embætinum í 1825 og flutti til Keypmannahavnar, har hann doyði í 1849.

## Heini Madsen: »Færøene i 1000 år« sigur um Løbner:

**1806.** Nólsoyar Páll skuldi fara við eini sendinevnd til Danmarkar at fáa lægri prísir og fríhandil. Løbner liggur í buktini.

**1807.** Løbner gremur seg um, at sjálvt børnini kvøða Fuglakvæðið, sum fer illa við embætismonnunum.

**1808.** Skansin yvirgevir seg eftir hóttan frá enska krígsskipinum Clio. Seinni sama ár er tað, at Brillumaðurin ger um seg.



*Napoleon Nolsø.*

**1813.** Løbner letur lítlu skonnartina Færø byggja lidna í Nólsoy. Hann letur gera ein bátalista, sum vísir, at 5500 føroyingar eiga 2.000 bátar. Kornheystið er 1800 tunnur.

**1815.** Innflytir tvær ær og ein spanskan veðr.

**1816.** Verður settur amtmaður og selur einasta skip í landinum, nevniliga umrødda Færøe.

**1820.** Løbner fær lyfti um, at føroyingar, sum vilja keypa skip, skulu fáa statsstuðul. Heitir á rentukamarið um at fáa niðursett seyða- og smørleigur.

**1821.** Verður settur sum amtmaður.



*Henrietta Elisabeth Nolsø*

*Mynd: Føroya Fornminnisfelag*

**1822.** Fær loyvi til, at suðringar kunnu handla fyri egna rokning, men fólk eru ikki við uppá tað.

**1824.** Útvegar eina slupp, Thorshavn, til sigling millum oyggjarnar.

**1825.** Fer av heilsuorsøkum til Danmarkar, men er framvegis amtmaður til 1828.

Konan bleiv verandi í Føroyum og búði saman við dótrini í Quillingsgarði.

Tað sigst, at tær vóru so samanknýttar, at Henrietta Elisabeth ikki vildi giftast fyrr enn mamman var deyð. Í deyðanum sameindust tær aftur í somu grøv.

Frú Løbner gav byggigrund til fyrsta bókasavnið.

Henrietta Elisabeth giftist við Napoleon Nolsø, f. 26.8. 1809 í Havn d. 28. 2. 1877.

Hann var sonur Anne Cathrine Pedersdatter og Jacob Nolsøe, sum var handilsforvaltari. Hann var beiggi Nólsoyar Páll. Napoleon tók læknaprógv í 1841 sum tann fyrsti føroyingurin, og hann var tingmaður 1852-1854 og 1865-1869.

Napoleon var lækni í Havn eitt skifti frá 1841, økislækni í Suðuroy, amtslækni 1858-65. Eftir hann liggur kvæðabók í trimum bindum í handriti frá 1840-51.

## Caroline Heinesen, mamma William, skrivar um Henriettu Elisabeth:

Der hvor apoteket nu ligger, boede der en færøsk læge, der blev kaldt dr. Nolsø. Ham har jeg ikke kendt, men hans kone, der var datter af amtmand Løbner. Hun var en sjælden fin og elskværdig dame. Hun havde rejst meget i Syden, især opholdt hun sig længe i Montreux og havde altid så meget at fortælle om sine rejser. Hendes lejlighed var gammeldags med tunge mahognimøbler og på væggen i hendes sal, som den trefags stue blev kaldt, hang der bl.a. et stort ungdomsbillede af kejser Napoleon, og rundt omkring var der forskellige kuriositeter, der var også en glasklokke. Når man blev lidt dernede nød fruen aldrig noget sammen med sine gæster. Hun sad lige overfor dem ved bordet, og underholdt dem og nødte dem til at tage for sig af de ting, der stod på bordet. Når der blev gjort hovedrengøring i hendes værelse, flyttede hun ikke ind i et andet. Nej, hun flyttede sig kun rundt i samme værelse, idet hun dog passede på, at vandet ikke dryppede over hende.

Når man mødte hende på gaden, snakkede hun meget, men standsede ikke. Blev kun ved at gå, da hun mente, at man blev syg, mere man standsede. En dag kom pigen ind og sagde til hende, at der var en lille pige, der ville tale med hende. Hun bad så den lille om at sætte sig ind i spisestuen, så skulle hun straks komme. Den lille pige var så søster Fanny (mamma Andrias í Vágsbotni), som kom for at spørge, om hun ikke måtte se billedet af kejser Napoleon, da hun havde hørt, at hun lignede ham så meget. Det morede fru Nolsøe. "Gå du bare ind i salen og se så meget du vil på ham. Det var også sandt, at Fanny lignede ham på det billede. Fru Nolsø var for resten kusine til gamle Kjelnæs. Man kaldte som oftest hendes mand for "gamle doctor". Han var søn af en Skel Nolsø i Kaldbak. (Hann var oldurabbabeiggi veðurmannin á Sosialinum). Da fru Nolsøe døde, blev så alle hendes smykker, hvoraf hun havde mange, især ringe, og alle hendes fine ting solgt på auktion. Jeg stod og så på alle de kendte ting og alle de kostbare ting, som ikke kunne spredes for alle vinde. Poul Kjelnæs arvede Fruetrø og bibliotekshaven. Jeg købte en lille violet tekande, som altid stod på et bord i fru Nolsøes spisestue, jeg ville havde en erindring fra det yndige hjem og den elskværdige og fine gamle dame.



*Napoleon og Henriette Elisabeth búðu í Nólsoyarstovu*



*Innskriftin á gravsteininum*

*ANNA SOPHIE LØBNER*
*F. KJÆLNÆS*
*f. 23. FEBR 1786*
*D. 18. JUNI 1872*

*HENRIETTE ELISABETH NOLSØ*
*F. LØBNER*

*F. 18. APRIL 1825*
*D. 6. NOVEMBER 1906.*

**Næstu ferð**
Komandi viku umrøða vit Grethu og Sigmund Arge.